## Viðmerkingar til málið 1. partur.

Eftir at Norðskálatunnilin varð tikin í nýtslu í 1976 vórðu tað alt fleiri, ið hildu tað verða skilagott, at halda áfram at fullføra eystur-og vesturfarleiðina við einum tunnli frá Millum Fjarða og Kambsdal.

Hesin tunnil vildi havt ómetaligan týdning fyri ferðsluna til og frá økinum Fuglafjørð-Gøta-Leirvík og Klaksvík og so Norðureysturoy, Streymoy og Vágar.

Tá ið einki røktist fyri, at hesin tunnilin kom, heitti Fuglafjarðar kommuna við skrivi tann 28. august 1978 á háttvirda Føroya løgting um sum skjótast at fara undir at gera berghol frá Kambsdali yvir Millum Fjarða. Størsta trýstið kom frá vinnulívinum í økinum, og ta serliga frá tungu og alsamt vaksandi vinnuni í Fuglafirði, ið hevði stóran flutningstørv.

***Í 1981*** gera Fuglafjarðar-, Gøtu- og Leirvíkar kommunur sáttmála um samstarv at byggja Ítróttar- og samkomuhøll. Kommunurnar eru í hesum sáttmála, sum eisini er góðkendur av Føroya landsstýri tann 24. november 1981, samdar um, at berghol verður gjørt gjøgnum Leirvíksfjall í Gøtudal sum skjótast. Tá ið henda bergholsgerð er byrjað, verður strongt á Løgtingið um at fremja bergholsgerðina úr Kambsdali/Millum Fjarða.

Sum kunnugt kom Ítróttarhøllin í 1983 og Leirvíksbergholið í 1985.

***Í 1999*** kom ein nýggj yvirskipað ætlan fyri samferðslukervið. Við rentugagns-skipanini vórðu útrokningar gjørdar av 5 ítøkiligum íløgum, Vágatunnlinum, Norðoyatunnlinum, Øravík-Hovstunnlinum og Kambsdal-Millum Fjarðatunnlinum.

Av hesum kom Kambsdalstunnilin út sum nr. 2, sum tann mest samfelagsgagnligi. Eisini varð sagt í kanningini, at um Norðoyatunnilin gjørdist veruleiki, loysti tað seg enn betur at gera Kambsdalstunnilin.

Sum kunnugt eru allar omanfyri nevndu verkætlanir vornar til veruleika uttan Kambsdalstunnilin.

Fuglafjarðar kommuna hevur í øll hesi skjótt 30 árini frá tíð til aðra tikið hetta málið upp við skiftandi landsstýri, landsverkfrøðingar og løgtingsmenn og altíð møtt vælvild og jaligar holdningar, men ongin tunnil er tiverri komin.

Í 2005 komu borgarstjórarnir í Klaksvík, Leirvík og Gøtu eisini við. Full semja var um, at allar 4 kommunurnar ynsktu at fáa ein tunnil yvir í Skálabotn. Saman vórðu vit á fundi við Landsverk og við Føroya landsstýri sama ár um verkætlanina.

Eisini á hesum fundum vórðu partarnir samdir um tað skilagóða í hesi ætlan.

Einki røktist tó fyri, at hesin tunnilin er í eygsjón, nú landsmyndugleikar tosa um nógvar smáar og stórar tunnlar og undirsjóvartunnlar runt alt Føroya land, sum skulu gerast skjótast gjørligt.

Samstundis økist trýstið á kommununa alt meira, nú vinnan veksur alt meira og meira, ikki bara í Fuglafirði men eisini á Kambsdali. Tungi flutningstørvurin í sambandi við vinnulívið til og úr kommununi er nú umleið 150.000 tons árliga, grótflutningur undantikin.

Hesin flutningur svarar til umleið 750 tonsum um døgnið yrkadagar, sum svarar til 40 tungar flutningsbilar dagliga, og sambært fyriliggjandi metingum verður flutningurin komandi árini væl meira enn tey 150.000 tonsini, havandi í huga meirframleiðsluna av eitt nú alifóðri hjá P/F Havsbrún til alivinnuna, og eisini at nýggja oljugoymslan hjá Mentir varð tikin í nýtslu beint eftir 01. juli 2008. Teir 40 tungu flutningsbilarnir kunnu lættliga verða tvífaldaðir og flutningsnøgdirnar somuleiðis.

Eisini er fólkaflutningurin nógv vaksin, síðan Føroya handilsskúli kom seinast í áttatiárunum og Studentaskúlin og HF skeiðið fyrst í nítiárunum.

Dagliga koma umleið 600 næmingar, lærarar og arbeiðsfólk á Kambsdal hvønn gerandisdag, umframt tann vanliga fólkaflutningin til og úr Fuglafirði.

Allur hesin flutningur hevði í stóran mun nýtt gott av nýggju farleiðini.

*Eisini vilja vit vísa á, at atkoman til og úr okkara øki er versnað, síðani rundkoyringin í Gøtudali er komin. Útsagnir frá teimum, ið koyra grót frá Hústoft til Fuglafjarðar havn er, at teir missa 1 túr fyri hvønn bilin um dagin.*

*Hvør bilur hevur góð 30 tons hvørja ferð, og er hetta í hægstu summartíð. Hvussu verður í vetrarhálkuni, kunnu vit bert gita okkum til?*

*Tað er hugstoytt hjá okkum at síggja, hvussu atkoman alla aðrastaðni í landinum verður betrað, meðan tað øvugta er galdandi fyri okkum. Onki løgið varð, um vit nú áttu tørn, serliga tá ið hugsað verður um, at tunnilin hevði komið serliga vinnuni á havnalagnum tilgóðar.*

*Henda vinnan hevur bert tey seinastu 10 árini latið landskassanum yvir 100 mió. kr. í partafelagsskatti og vinningsbýtisavgjaldi.*

Um hugt verður eftir ferðsluteljngunum á Varmakeldueiði 2006, so svarar teljingin til eina ársmeðalferðslu upp á 2.386 akfør, meðan akførini, sum fóru um Gøtueiðið vóru 4.378, og gjøgnum Leirvíkstunnilin 2.646. Um 70% av teimum ferðandi úr Norðoyggjum, Leirvík og Gøtu koma at nýta Kambsdalstunnilin, t.v.s. leiðina eystur/vestur, so kemur ársmeðalferðslan um Varmakeldueiðið helst at verða meira enn tvífaldað ella at liggja um tey 5000.

***Viðmerkingar til málið 2. partur.***

Ásannandi møguligum veruleika, at útlitini fyri at tað almenna fer í holtur við at gera tunnil yvir Millum Fjarða (Skálabotn) í bræði ikki eru serliga góð, hevur Fuglafjarðar býráð á býráðsfundi tann 26. juni 2008 samtykt, at næstbesta loysnin av málinum vildi verið Alt. II, at kommunan saman við eitt nú grannakommununum og Klaksvíkini, vinnulívinum og fíggingarstovnum kundi farið inn í eina felags ætlan, eins og gjørt er við Skálafjarðartunnlinum og stovna eitt partafelag.

Hetta felag skal hava til endamáls at eiga og reka tunnilin.

Fuglafjarðar kommuna hevur síðan kanna henda møguleika og hevur havt fundir við Vinnumálaráðið, Landsverk og Fíggingarstovnar.

Gjørdar eru fíggjarligar útgreiningar av møguligari tunnilsíløgu, hetta fyri at fáa til vega eitt nú grundarlag fyri at meta, um tunnilsverkætlanin kann bera seg á privatum grundarlagi.

Niðurstøðan er, at mett verður, at fyritreytirnar fyri, at tunnilin kann verða gjørdur á privatum grundarlag, eru til staðar. Ferðslugrundarlagið er gott, og eingi útlit skuldu verið fyri, at tað fer at minka í framtíðini. Eitt bummgjald á kr. 10,00 fyri persónbilar og kr. 40,00 fyri lastbilar hvønn vegin er nóg mikið til at reka og afturgjalda tunnilin innan fyri 30 ár.

Seinasta ár kom út "1. partur -Strategiskjal - Strategisk Samferðsluætlan 2008-2020" frá Vinnumálaráðnum. Hetta skjal leggur stóran dent á, hvønn lívsneyðugan týdning undirstøðukervið hevur fyrst og fremst fyri vinnulívið og millum annað útbúgvingarmøguleikar.

Her eru vit ikki ósamdir við Vinnumálaráðið, og tí halda vit, at Kambsdalur er rætta staðið at leggja linjuføringina yvir í Skálabotn.

Fuglafjørður, tann 22. juli 2008

**Fuglafjarðar býráð**